

**SPARINGAR**

*Tað, sum Suðuroyar Ellis- og Røktarheim á Tvøroyri sleppur undan at spara, skal sparast inn aftur í Vági*

# SPARINGAR Í SUÐUROY STANDA VIÐ

**SPARIKNÍVUR** Sparingarnar á Suðuroyar Ellis og Røktarheim verða ikki so stóran, sum fráboðað av fyrstan tíð, men tær verða framvegis ógvusligar

Áki Bertholdsen

Tað er nú greitt, at sparikravið til Ellis og Røktarheimið á Tvøroyri, verður ikki so ógvusligt, sum tað annars varð boðað frá í summar.

Men sparingarnar verða framvegis so mikið ógvusligar, at tað slepst ikki undan at siga fleiri fólkum úr starvi á heiminum.

Hinvegin er eisini greitt, at sparingarnar sum skulu setast í verk hjá Nærverkinum í Suðuroy, fara eisini at raka virksemið í Vági.

Nærverkið hevur nevniliga eisini boðað frá, at fyri at spara, verður minni virksemi sett í verk í 2011.

Tað vísa skjøl, sum Sosialurin hevur fingið innlit í.

Nærverkið sigur, at upprunaliga sparikravið til Suðuroyar Ellis og Røktarheim upp á 2,7 milliónir, er nú sett næstan niður í helvt, so at tað nú er talan um 1,478 millión, sum skal sparast.

- Hina helmingina av sparingini skal Nærverkið halda við at setta minni virksemi í verk í Vági í 2011, sigur Mary J. Í Garði, stjóri á Nærverkinum í brævi til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim.

**» Minni virksemi skal setast í verk í Vági**

### Átta pláss skerjast

Men Nærverkið nýtir eisini høvi til at minna á fíggjarlógina fyri næsta ár, har tað stendur, at í virksemið á Ellis- og Røktarheiminum á Tvøroyri verður minkað so líðandi, "soleiðis at tað í seinasta lagi 1. januar í 2012 eru 8 búpláss færri, tí 8 dupultkømur verða gjørd um til einkultkømur"

Men sparingarnar enda ikki her, tí Nærverkið ger samstundis vart við, at næsta ár verður dagsprísurin minni hjá ellis og røktarheinum og tí kann Suðuroy ellis- og Røktarheim vænta at fáa eitt sparikrav afturat.

Hvussu stórt tað verður, hevur Nærverkið ikki roknað út enn.

*aki@sosialurin.fo*

## Nógv rok

Tað elvdi til nógv rok í summar, tá ið tað frættist, at umfatandi sparingar skuldu setast í verk hjá Nærverkinum í Suðuroy næsta ár.

Boðað frá frá sparingum upp á 2,7 milliónir á Suðuroyar Ellis og Røktarheimi og tað hevði kostað 15 fólkum starvið.

Samstundis skuldu átta tvímannakømur gerast um til eittmanskømur og sostatt verða átta búpláss færri á heiminum.

Ongin kann tryggja eina ávísa náttúrliga frágongd á Suðuroyar Ellis- og røktarheimið. Men sparingarnar skuldu tryggjast við at brúka nýggja ellis – og røktarheimið í Vági til kitt. Tað merkir,at virksemið á nýggja heiminum í Vági skal avmarkast, til vissa er fingin fyri, at nátúrlig frágongd, sum tað eitur, á heiminum á Tvøroyri, hevur ført til, at tey átta tveymannakømrini vórðu blivin til eittmanskømur.

Tað merkir eisini, at so hvørt búfólk fella frá á heiminum á Tvøroyri, verða ongi nýggj tikin inn, líka til øll tvímannakømrini eru blivin til eittmanskømur.

So hvørt sum frágongd er á Tvøroyri, kann virksemið í Vági so økjast samsvarandi, til roknistykkið passar.

Men tað merkir so eisini, at tilsamans í Suðuroy verða átta ellis- og røktarheimspláss færri, enn tað annars høvdu verið.

Sum tað sæst í hinum greinunum her á síðuni, er sparikravið nú linkað niður í helvt, men ætlanin um at niðurleggja tvímannakømrini so líðandi stendur við.

# Fleiri fólk missa starvið í Suðuroy

**HÓPUPPSØGN** Hóast ein partur av sparikravinum er tikin aftur, verður framvegis neyðugt at siga fleiri starvsfólkum upp á Suðuroyar Ellis og Røktarheimi

Áki Bertholdsen

Hóast sparkravið til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, er linkað reiðiliga fitt, verður tað framvegis neyðugt at siga fleiri starvsfólkum upp.

Tað staðfestir Ronnie Midjord, stjóri fyri heimið.

Upprunaliga varð talan um eitt sparikrav upp á 2,7 milliónir og tað hevði ført til, at 15 fólk fara at missa starvið.

Nú er sparikravið minkað niður í 1,478 millión og tað er munandi minni.

- Men talan er framvegis um eina stóra sparing og tað er onki at ivast í, at tær skulu finnast á lønarútreiðslunum, tí tað er næstan bara har, at sparingar gera nakran mun, sigur Ronnie Midjord.

Hann hevur onga viðmerking til, hvussu nógvar uppsagnirnar verða í tali.

Men av tí, at upprunaliga sparingin upp á 2,7 milliónir førdi til, at 15 fólk skuldu sigast upp, vísir einføld høvuðrokning, ein ein sparing upp á 1,478 millión førir til, at eini átta fólk fara at missa starvið.

Men so er ikki lagt upp fyri teimum sparingum, ið standast av, at dagprísurin eisini lækkar, soleiðis, sum Nærverkið hevur boðað frá.

Tað er heldur ikki lagt upp fyri teimum sparingum, ið ein møgulig lønarhækking í samráðingunum, sum nú eru, fara at krevja, tí samgongan hevur boðað frá, at allar lønarhækkingar skulu heintast inn aftur við sparingum, tí lønarútreiðslurnar verða ikki hækkaðar.

Ronnie Midjord váttar, at hann skilir skrivið frá Nærverkinum soleiðis, at næsta ár skulu átta tveymannakømrini á Ellis- og røktarheiminum niðurleggjast.

Hvussu tað fer at ávirka sparitiltøkini, dugur hann ikki at siga upp á standandi fót.

Annars sigur hann, at tey fara at biðja um fund við leiðsluna í Nærverkinum í næstu framtíð fyri at fáa fulla greiði á, hvussu hevði nýggju boðini skulu skiljast, heilt ítøkiliga.